

# Norðborg tikin í Noreg

Nótaskipið Norðborð, sum roynir eftir sild, er aftur tikin í dag. Hetta skrivar Vágaportalurin, sum hevur roynt at fingið samband við reiðaran, Eyðun Rasmussen, men hann hevur ikki verið at hitta. Tað er stutt síðani - fyrst í hesum mánaðinum - at Norðborg varð tikin av norsku sjóverjuni, og tað sær út til at vera júst tað, sum er hent aftur nú. Tá tók norska sjóverjan Norðborg, tí illgruni var um, at skipið hevði koyrt sild útaftur, skrivar Vágaportalurin.



*Innanfyri atløgubryggjuna hjá Teistanum liggja nakrir bátar. Tað eru hesir bátar, ið nú skulu vera fluttir, um eigararnir ikki skulu verða meldaðir*

onki løgi í, at vit ikki vita hvørji boðini eru, greiðir bátseigarin frá.

## Kann vera okkurt við býráðnum

Í 2005 komu bygdirnar í økinum inn í Tórshavnar kommunu, og Sigmar Hansen hevur ein illgruna um, at tað er Landsverk, sum vil hava eina avtalu við Tórshavnar kommunu.

- Tað kundi verið, at Landsverk ikki vil geva pláss til okkum tí teir vilja geva kommununi ábyrgdina, men heldur ikki havnarfútin í Havn fær hjálpt okkum.

- Eg vóni bara, at kravboðini verða tikin aftur, ella freistin í hvussu so er longd, tí so hevur mann tíð at umráða seg, ella í hvussu so er tíð at umhugsa støðuna, fortelur Sigmar Hansen, bátseigari.







*Frífinn Nolsøe, ið hevur skrivað undir kravboðini frá Landsverki, metir seg ikki hava loyvi til at úttala seg til fjølmiðlarnar*

# Vit mugu skipa viðurskiftini við bátaplássunum

**Oyvindur Brimnes leggur dent á, at Landsverk er til at tosa við, men vantandi reaktiónir frá eigarum og kommunu hava havt við sær, at okkurt sterkari nú mátti til**

BÁTAPLÁSS
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Landsverk leggur dent á, at fyri teir er talan um eina kommunala uppgávu, sum teir higartil hava loyst. Hesum vilja teir ikki halda fram við, og tí eru kravboðini nú komin.

- Vit royndu fyrst at boða frá. Fyrst í bløðunum, og síðani í brævið til eigararnar. Frá okkara síðu er onki skeivt fari fram. Hetta er í hvussu so er vanliga mannagongdin hjá kommununi og øðrum, men kanska hevur freistin verið ov stutt, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki.

Stjórin í Landsverki leggur afturat, at bátaeigararnir ongantíð hava fingið loyvi at liggja, har teir liggja, og teir, sum hava spurt hava eisini fingið at vita, at teir ikki sleppa at liggja har.

## Mugu hava skipaði viðurskifti

Stjórin í Landsverki heldur eisini, at skipaði viðurskifti eru ein fyritreyt fyri bátapláss.

- Mann kann bara hugsa sær, um ein bátur legði seg á Tinganesi, tá skuldi onkur nokk talað at. Sjálvandi mugu vit hava skipaði viðurskifti. Bæði innan trygging og vanliga ábyrgdarkenslu, fáa vit ein trupulleika, um okkurt óhapp skuldi hent við Gomlu Rætt, greiðir stjórin frá.

## Eru til at tosa við

Frá Landsverki siga teir eisini, at ein dagur ikki skal skilja partarnar og tí verður freistin kanska broytt.

- Skal mann lýsa trupulleikan, er lætt at koma fram til, at freistin á onkran hátt hevur verið rættiliga stutt, men tað kann gott henda seg, at vit broyta freistina, so teir fáa ein livandi kjans at flyta bátarnar. Tí hevði tað verið gott at fingið onkra reaktión frá kommununi, ið hevur ábyrgdina av at útvega bátapláss til íbúgvarnar í kommununi, sigur Oyvindur Brimnes, sum leggur afturat, at hendа upprudding verður gjørd alt ov seint, men at nú er mann komin hartil, at skipaði viðurskifti mugu koma viðvíkjandi hesum bátaplássum.

Stutt fyri, at blaðið fór til prentingar komu boð frá Landsverki, at freistin er útsett, tí avgjørt er at fara á fund við kommuna, har finnast skal fram til eina loysn á bátaplássunum.

- Kravið er útsett til eftir fundin, og tað eru helst einar tvær vikur, sigur Oyvindur Brimnes.



*Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki*